## Hvalaveiði fyri skotum



Tað vakti stóran ans, tá fráfarandi íslendski fiskimálaráðharrin, Einar K. Guðfinnsson, fyrr í vikuni gjørdi av at heimila hvalabátum at veiða stórhval. Fráfarandi ráðharrin er úr Sjálfstæðisflokkinum, sum nú fer úr stjórnini, og politikarar í hinum flokkunum harta hann fyri at hava skvika sær at taka avgerðina, áðrenn hann skuldi frá. Eisini hansara samgongufelagar í Samfylkingini finnast hvassliga at avgerðini, og teir hava boðað frá, at tann nýggja stjórnin fer at endurskoða avgerðina, sum teir siga vera skaðiliga fyri umdømi Íslands í útheimi.

## Stórur áhugi fyri Grønlandi

Lonely Planet hevur valt Grønland sum eitt av teimum mest áhugaverdu ferðamálunum. Orsøkin er, at fólk vilja fegin sleppa at síggja ta upprunaligu arktisku náttúruna, áðrenn veðurlagsbroytingarnar gera enda á henni. Á skrivstovuni hjá ferðavinnuráðnum í Grønlandi hava tey lagt merki til tann stóra áhugan, sigur KNR, og áhugin er ikki blivin minni, eftir at ein amerikonsk frágreiðing er komin til ta niðurstøðu, at tað ber ikki til at steðga tí veksandi hitanum á jørðini.

# Menna sólorku á Kambsdali

**Arbeiðið við at menna varandi orkukeldur fer í næstum av bakkastokki. Fuglafjarðar kommuna hevur valt at stuðla verkætlanini, hvørs endamál er at finna fram til búskaparliga virðið í sólorku**

VARANDI ORKA
*Eilen Anthoniussen*
*eilen@sosialurin.fo*

Arbeitt verður í løtuni við at seta ferð á nýggja verkætlan, ið umfatar alternativar orkukeldur. Við í verkætlanini eru Center for Arktisk Teknologi í Sisimut, Pure Energy í Hetlandi, Náttúruvísundadeildin á Fróðskaparsetrinum og Studentaskúlin á Kambsdali. Sólfangarar verða settir upp við skúladepilin á Kambsdali, sum skrásetir framleiðsluna av sólorku, umframt mátitól, ið máta sólstyrki, hita og vind.

- Vit hava veitarar av sólorkuskipanum í Føroyum, sum vit vita rigga væl. Men vit hava onga dokumentatión fyri hvussu væl tær virka. Dokumentatiónin er grundarlag fyri fígging av gransking av hesum slag, og tí eru vit farin undir eitt samstarv við Center for Arktisk Teknologi um at máta sólorku í Føroyum, sigur Vilhjálmur Nielsen, ráðgevi fyri Rhesa.

Fuglafjarðar kommuna hevur játtað at stuðlað hesi NORA verkætlanini, og sólfangarnir, ið verða settir upp til at máta føroysku sólorkuna, verða settir upp á Studentaskúlanum á Kambsdali. Samstundis verður øll sólorkuframleiðsla máld og løgd á eina heimasíðu, sum miðlar orkumátingina til almenningin. Verkætlanin er liður í miðvísari ætlan um at spara um oljuútlátið í Føroyum, og at menna sólorku í staðin.

- Tað er umráðandi at vita undir hvørjum umstøðum vit framleiða nógva sólorku, og hvør háttur er best, og hendan skipanin kann upplýsa júst hvønn dag vit framleiða mest, greiðir ráðgevin fyri Rhesa frá.

Grundarlagið undir arbeiðnum er stuðulin frá Fuglafjarðar kommunu. Aftur fyri fær kommunan orku, og skipanin veitir somuleiðis skúlanum orku. Verkætlanarskeiðið er í fyrstu atløgu tvey ár, men vónandi verður sólhitaskipanin við í arbeiðnum at menna varandi orkukeldur.

Hetta er fyrsta verkætlanin av hesum slag. Endamálið er umframt granskingararbeiðið í sólorku í Føroyum, at vísa á samfelagsbúskaparliga virðið í sólorku.

Í samband við verkætlanina verður ein millumtjóðaráðstevna tann 24. apríl, og um somu tíð verður farið undir verkætlanina.



*Í vár verður farið undir verkætlan, sum skal fremja varandi orku í Føroyum. Sólfangarar verða settir upp við Studentaskúlan í Kambsdali* *Savnsmynd*

J. C. Svabosgøta 12
FO-100 Tórshavn
Tlf: 32 17 31

Fax: 32 17 34
hoyrnin@kallnet.fo
www.hoyrnin.fo

HOYRNIN

Skrivstovufólk til Sp/f Hoyrnin

**Sp/f Hoyrnin í Tórshavn søkir eftir skrivstovufólki til 3 / 4 tíðarstarv at byrja skjótast gjørligt.**

**Høvuðsarbeiðsuppgávur:**
- Alt vanligt bókhaldsarbeiði
- Telefonavgreiðsla
- Vanligt skrivstovuarbeiði

**Førleikakrøv:**
- Hóskandi útbúgving og royndir á økinum
- Góðan kunnleika til føroyskt og danskt
- Góðan kunnleika til Word, Excel, Outlook og bókhaldsskipanina Sirius (ella líknandi)

**Persónligir eginleikar:**
- Evni at arbeiða sjálvstøðugt
- Álítandi og fyrikomandi

**Løn:**
Lønin verður ásett eftir avtalu við atliti at royndum og útbúgving

**Umsóknir:**
Sendið skrivliga umsókn við avritum av prógvum og viðkomandi skjølum til:

Sp/f Hoyrnin
J. C. Svabosgøta 12
FO-100 Tórshavn

**Umsóknarfreist:**
Umsóknarfreistin er fríggjadagin 20.02.2009.

Allar umsóknir vera viðgjørdar í trúnaði.

# Tórshavnar kommuna dyrgir eftir SEV bygningi

**SEV hevur ætlanir um at byggja út á Landavegnum, og Tórshavnar kommuna hevur víst áhuga fyri bygninginum á Varðagøtu. Enn vil borgarstjórin einki siga um hvat bygningurin skal nýtast til**

KOMMUNA
*Eilen Anthoniussen*
*eilen@sosialurin.fo*

Sambært Heðini Mortensen, borgarstjóra, vóru ætlanir lagdar fram á aðalfundi hjá SEV um at byggja út á Landavegnum. Í tí tilgongdini ætlar SEV at selja burturav sínum bygningum, og ein av hesum er gamli bygningurin við Varðagøtu. Í gomlum døgum átti Tórshavnar kommuna økið í Gundadali, og í dag er Tórshavnar kommuna partur av SEV.

- Tórshavnar kommuna hevur víst áhuga í bygninginum áhuga. Talan er um ein rættiliga stóran bygning, sum kann nýtast til nógv ymisk endamál. Enn er tó einki annað hent í málinum, enn at býráðið hevur víst bygninginum áhuga.

Tað eydnaðist ikki Sosialinum at fáa orðið á stjóran hjá SEV, ið var upptikin á fundi.